# Teldutøkar teoriroyndir á Akstovuni

**Nýggju teldutøku teoriroyndirnar hjá Akstovuni vórðu mánadagin sýndar fram fyri landsstýrismanninum í ferðslumálum við sera góðum úrsliti**

PRÓVTØKA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mánadagin 13. november var tíðindafundur á Akstovuni í sambandi við at nýggju teldutøku teoriroyndirnar til persónbil vórðu sýndar fram fyri Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í ferðslumálum. Høvið var eisini hjá fjølmiðlunum at royna nýggju skipanina.

Skipanin varð fyrstu ferð roynd hósdagin 26. oktober við sera góðum úrsliti.

Nú virka teoriroyndirnar soleiðis, at næmingarnir sita við ein telduskíggja við ferðslumyndum, meðan ein rødd lesur spurningarnar upp. Næmingarnir skulu síðan svara ja ella nei upp á teir ymisku spurningarnar.

Tá royndin er liðug, skrivar teldan út úrslitini av royndini við viðmerkingum um hvar í møguligir feilir eru.

Næmingarnir skuldu gjøgnum 25 myndir og skuldu taka støðu til umleið 90 spurningar. Fyri at klára royndina skulu næmingarnir ikki hava meira enn fimm feilir.

Dentur er lagdur á, at myndirnar skulu vera týðuligar, og at málbrúkið er lætt og væl skiljandi.




*Jákup Jacobsen, stjóri á Akstovuni, greiðir frá um nýggju teldutøku teoriroyndirnar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Her er tað Jens Kristian Vang, myndamðaur hjá Sosialinum, sum roynir nýggju skipanina*
*Mynd: Bjarni Djurholm*




Á Arbeiðsmarknaðardeildini eru 7 sosialráðgevar og 1 deildarleiðari. Arbeiðsmarknaðardeildin umsitur mál um fyritíðarpensjón, og endurbúgving, herundir útbúgvingar- og arbeiðsmarknaðartiltøk.

Deildin skal vera við til at fremja politiska viljan um ein rúmligan arbeiðsmarknað, har pláss skal vera fyri øllum, hóast skerjingar í arbeiðsførleikanum.

Visiónin er, at fólk skulu gerast virkin, ístaðin fyri at fáa eina óvirknað veiting.

Deildin verður væntandi uppnormerað í 2007.

## Arbeiðsmarknaðardeildin søkir skrivara

Vit sóknast eftir einum persóni við skrivstovuútbúgving ella aðrari hóskandi útbúgving at virka sum skrivari og at samskipa arbeiðið við fyritíðarpensjóns-, endurbúgvingarmálum og arbeiðsmarknaðartiltøkum

**Arbeiðsroyndir / førleikakrøv:**

- Góð evni at orða seg bæði munnliga og skrivliga
- Hollan kunnleika til EDV – kunnleiki til Windows Office er ein fyrimunur
- Smidleiki og góð samstarvsevni og -vilji
- Evni at hava yvirlit og arbeiða við fleiri ymiskum málum og viðurskiftum í senn
- Góð evni til at umstilla seg í sambandi við broytingar í umsitingini
- Tað er ein fyrimunur at hava kunnleika til medisinska terminologi, royndir innan almenna umsiting og innlit í almannalóggávuna

Hevur tú hug at royna teg í einum livandi tvørfakligum og fjølbroyttum arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum, har samskipan og samstarv við onnur starvsfólk hevur serligan týdning í arbeiðnum, er hetta nakað fyri teg. Vit kunnu bjóða eitt starv í støðugari menning og møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.

**Arbeiðs- og ábyrgdarøki:**

- gera umsitingarliga partin av fyritíðarpensjóns- og endurbúgvingarmálum kláran til fundarviðgerð
- skipa fyri og virka sum skrivari á fundum og fyri leiðaran
- samskifta við læknar, sjúkrahús, útbúgvingarstovnar v.m. og útvega upplýsingar og skjøl frá hesum
- samskifta og samstarva við sosialráðgevar og útvega skjøl, sum eru neyðug fyri málsviðgerðina
- samskifta við viðskiftafólk
- aðrar skrivarauppgávur

**Lønar- og setanarviðurskifti:**

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjun Berg, deildarleiðara á tel. 35 35 70 ella 21 54 88.

Skrivlig umsókn við avritum av próvskjølum, CV o.ø. skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 24. november 2006, kl. 12. Vinarliga merkið brævbjálvan: "Arbeiðsmarknaðardeildin" og send umsóknina til Almannastovuna, Smyrilsvegur 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA.FO - TEL 47 80 80